Fólkaflokkurin havt landsfund:

# Staðfestu støðuna

**Landsfundurin hjá Fólkaflokkinum, sum varð hildin um vikuskiftið, stuðlaði politisku gongdina hjá flokkinum. Fundurin metti eisini, at gjaldið at ferðast um vágatunnilin var ov høgt**

LANDSFUNDUR
*Heri á Rógvi*



*Tummas í Garði var gestarøðari á landsfundi Fólkafloksins um vikuskiftið. Hann vísti á, at støðan á heilsuverkið er betri, enn tað oftani verður ført fram*

Um vikuskiftið helt Fólkaflokkurin landsfund í Havn. Árligi landsfundurin varð skipaður sum teir undanfarnum við politiskum kjaki og einum gestarøðara.

Óli Breckmann, formaður fyri tingbólkin hjá Fólkaflokkinum, greiddi frá politisku gongdina seinasta árið. Løgtingsvalið og hendingarnar í sambandi við nýggju samgonguna fyltu størsta partin.

Sambært heimasíðuni hjá Fólkaflokkinum legði Óli Breckmann eisini stóran dent á at lýsa búskaparpolitisku gongdina seinastu tíðina og í hálvfemsunum.

Til eitt tílíkt høvi kann heldur ikki sleppast undan at nevna tann so kenda skattalættan.

— Eingin hevur nakrantíð klárað at spart seg til ein skattalætta, segði Òli Breckmann.

## Heilsuverkið væl fyri

Gestarøðari á fundinum var Tummas í Garði. Hann er fólkafloksmaður og var uppstillaður fyri flokkin til seinasta løgtingsval, men hann er eisini narkosu- og yvirlækni á Landssjúkrahúsinum. Evnið í røðu hansara var heilsuverkið.

Sambært heimasíðuni hjá Fólkaflokkinum víst Tummas í Garði á, at gongdin innan heilsuverkið í Føroyum var positiv.

– Tað gongur betur. Færri fólk doyggja á bíðilistum. Heilsuverkið gerst betur og betur, men vit hoyra dagliga, at heilsuverkið gerst verri og verri, segði Tummas í Garði millum annað.

— Vit hoyra áhaldandi: Tað er væntandi ella ov lítil játtan, sum er orsøkin til elendigheitina. Hetta passar ikki.

Um játtanin verður hækkað 20% fáa vit neyvan 20% betri heilsuverk, sigur Tummas í Garði.

Sambært Tummasi er politiski trupulleikin, at einki tamarhald er á forbrúkinum í sjúkrahúsinum.

## Strangari útlendingapolitikk

Annars fór tað mesta av tíðini á landsfundinum við, at ymisk fólk sluppu framat at siga sína hugsan.

Fólkafloksungdómur hevði millum annað orðið. Í tí felagnum kundu limirnir hugsað sær at sæð strangari lógir á útlendingaøkinum.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevði fleiri reistir orðið á fundinum. Hann greiddi sínum partamonnum frá gongdina og einamest nýggju samgonguni. Hann nevndi, at tann nýggja danska stjórnin var nógv betri at tosa við um yvirtøkur enn hon hjá Poul Nyrup Rasmussen.

— Bólturin liggur hjá okkum, segði løgmaður.

Áhugavert er eisini at leggja til merkis, at løgmaður helt fyri, at níggju ráð eru ov nógv. H

— Hetta var kortini neyðugt fyri at fáa kabalina at ganga upp, sigur Anfinn Kallsberg.

Málið um vágatunnilin kom eisini fyri dagin á landsfundinum. Semja var um, at kostnaðurin fyri at ferðast í tunlinum var ov høgur. Fólkaflokkurin ætlar sær á fund við nevndina í P/F Vágatunnilin at kunna seg meira um málið.



*Uppmøtingin hjá fólkafloksfólki leygardagin var góð. Fundurin varð hildin í Pállsstovu í Havn*





*5. desember er settur til at verða dagurin, tá virksemið hjá Televarpinum fer av bakkastokki. Nakrar dagar framman undan verður sløkt fyri Rás Tórshavn, og harvið ókeypis fylgisveinasjónvarpinum.*
*Mynd: Àlvur Haraldsen*

# Televarpið: Premiera 5. desember

**Eftir ætlan byrjar Televarpið at senda 5. desember við 25 rásum. Enn er einki komið upp á pláss viðvíkjandi Danmarks Radio. Og so sleppa øll í høvuðsstaðnum at síggja Robinson finaluna**

SJÓNVARP
*Heri á Rógvi*

Arbeiðið at fyrireika Televarpið er nú komið so langt ávegis, at ásettur er ein premieru dagur, sum tó ikki hundrað prosent fastlagdur enn. Hósdagin 5. desember ætlar Televarpið at byrja at senda. Televarpið er ein dóttur fyritøka hjá Føroya Tele, sum skal víðarisenda fylgisveinarásir til føroyingar.

Byrjanin til Televarpið hjá Føroya Tele var fyri so vítt ásannanin hjá Tórshavnar býráð, at tað ikki loysti seg longur hjá teimum at senda ókeypis fylgisveinasjónvarp til sínari borgarar umvegis Rás Tórshavn.

## Robinson yvir alt

Tá byrjað verður at senda 5. desember, so merkir hetta eisini, at íbúgvar í høvuðsstaðnum, sum seta teirra álit til Rás Tórshavn, sleppa at síggja allar partarnar av Robinson. Finalan í Robinson kappingini, sum skuldi verið tann endaliga, verður hin 2. desember. Hesa sleppa borgarar í høvuðsstaðnum so at síggja.

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, sigur, at teir hava sum so ikki tikið endaliga støðu til øll viðurskiftini um Rás Tórshavn. Fíggjarnevndin hjá Tórshavnar býráð skal á fundi hóskvøldið endaliga taka støðu til lagnuna hjá Rás Tórshavn.

— Ùtgerðin skal seljast til Føroya Tele. Hetta skulu vit fáa endaliga upp á pláss. So skal eisini gerast av, nær vit formelt sløkkja, sigur Jan Christiansen.

Galandi avtalur hjá Rás Tórshavn eru til endan av hesum árinum, og einki er sett til komandi ár. Tórshavnar kommuna fer at spara eina millión um árið, nú einki Rás Tórshavn er at gjalda fyri longur.

Eftir hvat skilst, var tað hildið vera best av øllum pørtum, um bíðað varð til eftir Robinson finaluna at sløkkja fyri Rás Tórshavn.

## Rásirnar

So gott sum allar avtalur eru nú komnar upp á pláss viðvíkjandi rásum hjá Televarpinum. Samráðst verður enn við DR um eina avtalu, og onkur onnur rás liggur eisini í buktini, og endaliga avgjørt er ikki, um hendan ella hesar koma við.

Samlaða yvirlitið yvir rásir stendur at lesa aðrastaðni á síðuni.

Tróndur Djurhuus, stjóri fyri Televarpið, upplýsir fyri Sosialinum, at teir sum er ætla at byrja 5. desember at senda. Dagin eftir, hin 6. desember, verða móttakararnir (set-top boksirnar) til sølu. Kostnaðurin fyri hesar verður umleið 2.000 kr. Til endan av árinum verður tað ókeypis at síggja Televarpið. Boksirnar verða at fáa í ymsum radiohandlum og aðrastaðni. Talan er um móttakarar, sum umbróta digital (talgilt) signal til sjónvarpsmyndir. Móttakarin, sum væntandi verður gestur í flestu føroysku stovum í næstum, er meinlíkur móttakarum, sum fólk kenna frá parabolum.

Útboðið av rásum hjá Televarpinum er annars ógvuliga meinlíkt útboðnum hjá komandi kappingarneytanum Canal Digital. Fyri so vítt er talan um júst tær somu rásirnar.

Eins og við Canal Digital verður útboðið býtt í fleiri ymsar pakkar. Tað hevur ikki eydnast okkum at fingið upplýst prísir, men eftir hvat skilst, er talan ein "bíligan" pakka við nógvum rásum, og síðani koma dýrari pakkar við rásum sum Canal+ og kanska eisini DR.

Ein av rásunum hjá Televarpinum er tann sokallaða INFO rásin. Hendan rásin er rás, sum Televarpið í roynd og veru sjálvt eigur. Televarpið fer tó ikki sjálvt at senda annað eitt upplýsandi tilfar á hesari rásini.

Tróndur Djurhuus sigur, at teir í løtuni arbeiða við at koyra prosjekt av bakkastokki, sum hevur til endamáls at kanna, hvøjar møguleikar eru til at nýta INFO rásina til at senda ymiskt forkunnugt føroyskt tilfar. Roknast skal tó ikki við føroyskum tíðindum, tí hetta verður væntandi ov dýrt at framleiða.

Annars er tað at siga um rásirnar hjá Televarpinum, at talan er um enskar og danskar rásir. Útboðið fevnir um tónleika-, barna-, tíðinda-, ítrótta-, films- og undirhaldsrásir umframt aðrar.

## Rásirnar

**Rásirnir, ið Televarpið hevur tikið endaliga støðu til vera við í teirra útboði, eru hesar:**

SvF (Skal vera við sambært Kringvarpslógini)
INFO (Egin rás hjá Føroya Tele, sum kann nýtast til ymisk endamál)
Canal+ (tríggjar)
TV Danmark 1
TV Danmark 2
CNN
CNBC
MTV
VH1
VH1 Classic
God Channel
Fox Kids
Cartoon Network
Eurosport
Eurosport News
Hallmark
TCM
BBC Prime
BBC World
Animal Planet
National Geographic
Discovery

Afturat hesum koma møguliga aðrar rásir. Rásirnar verða seldar í ymsum pakkum. Prísirnir vera ymiskir, alt hvussu nógvar og hvørjar rásir, ein velur.

# Sett leiðara



*Aksel Haraldsen skal samskipa á besta hátt, soleiðis at kundarnir hjá Televarpinum fáa bestu tænastuna.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Aksel Haraldsen er settur í starv sum dagligur leiðari fyri Televarpið. Kann kemur frá einum øðrum leiðarastarvi hjá Føroya Tele innan kundarøkt.

Nýggi leiðarin er útbúgvin elektrikari. Hann hevur starvast hjá SEV, áðrenn hann byrjaði hjá Føroya Tele. Nøkur kenna hann kanska eisini aftur frá føroyskari svimjing.

Hann verður einasta starvsfólki hjá Televarpinum. Restin av funktiónunum verða latnar øðrum at umsita fyri Televarpið.

Televarpið er dótturfelag hjá Føroya Tele, men hevur sundurskildan roknskap og verður sum so rikið sum ein fyritøka fyri seg.

## 1 boks/sjónvarp

Tað vert at hava í huganum, at kundar hjá Televarpinum í framtíðini mugu sum er hava ein móttakara (set-top boks) til hvørt sjónvarp.

Sent verður eitt talgilt signal, sum krevur eina boks við einum korti til at broyta signalið til sjónvarpsmyndir.

Tað ber til at leiða signalið runt umvegis eitt nú videotóli, men so skulu øll síggja somu rás.

Skalt tað hinvegin bera til, eins og tað ger nú, at hyggja at ymsum rásum í ymsum sjónvarpi ymsastaðni í húsinum samstundis, so krevur hetta fleiri móttakarar og fleiri kort, og harvið fleiri hald.

Ein móttakari fer at kosta umleið 2.000 kr.

**-HR**